# ÁRSROKNSKAPUR 2020

P/F Vindfelagið í Neshaga
Tórshavn · Skrás. nr. 6387



# Fimm grønar orkukeldur í elskipanini í 2020

www.sev.fo

P/F VINDFELAGIÐ Í NESHAGA / ROKNSKAPUR 2020 3



# Ársfrásøgn 2020

## P/F Vindfelagið í Neshaga

Tórshavn

Skrás.nr. 6367

# Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársroknskapin fyri roknskapartíðarskeiðið 1. januar - 31. desember 2020 hjá P/F Vindfelagnum í Neshaga.

Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2020 og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskapar-tíðarskeiðið 1. januar - 31. desember 2020.

Leiðslufrágreiðingin gevur, eftir okkara fatan, eina rættvísa frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 19. mars 2021

## Stjóri

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

## Nevnd

*Kári Johansen*
*Formaður*

*Haraldur S. Hammer*
*Næstformaður*

*Niclas Hentze*

*Oddmar á Lakjuni*

*Poul Klementsen*

*Sonni L. Petersen*

*Sune Jacobsen*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**TIL KAPITALEIGARARNAR Í VINDFELAGNUM Í NESHAGA**

**NIÐURSTØÐA**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vindfelagið í Neshaga fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2020 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2020 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSROKNSKAPINUM**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV AT GRANNSKOÐA ÁRSROKNSKAPIN**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapin, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum við eyðmerkja undir grannskoðanini.

**UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 19. mars 2021

P/F Januar

Løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá

Statsaut. revisor

# Høvuðs- og lyklatøl

INNTØKUBÝTI

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 3.809 | 5.732 | 6.770 | 6.681 | 6.552 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 2.163 | 4.390 | 5.920 | 5.783 | 5.834 |
| Rakstrarúrslit | -925 | 1.302 | 2.770 | 2.718 | 2.809 |
| Fíggjarligir postar, netto | -478 | -516 | -540 | -597 | -1.019 |
| **Ársúrslit** | **-1.150** | **645** | **1.829** | **1.662** | **1.545** |
| | | | | | |
| Fíggjarstøða | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 96.332 | 34.423 | 36.166 | 36.539 | 36.965 |
| **Eginogn** | **9.383** | **12.681** | **12.036** | **10.207** | **8.545** |



# Leiðslufrágreiðing

**HØVUÐSVIRKSEMI**
Virksemi felagsins er framleiðsla av ravmagni úr vindorku.

**GONGDIN Í VIRKSEMINUM OG FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTUNUM**
Samlaða vindorkuframleiðslan í Føroyum var 10% lægri í 2020 í mun til árið fyri. Laka úrtøkan úr vindorku er serliga orsakað av, at fleiri av myllunum bæði í Neshaga og í Húsahaga hava verið raktar av generatorbreki, sum krevur umfatandi umvælingar. Hesum umvælingararbeiði tekur eitt serligt generatortoymi hjá Enercon í Svøríki sær av, men arbeiðið hevur partvíst verið darvað av koronaavmarkingum.

Í Neshaga hava stórir trupulleikar staðist av generatorfeilum í trimum av fimm myllum, sum hava staðið stillar stóran part av 2020. Úrtøkan gjørdist sostatt bert 60% av miðalframleiðsluni árini 2015-2019.

Sølan fyri árið 2020 var 3,8 mió. kr. í mun til 5,7 mió. kr. í 2019. Framleiðslan av elorku var 9,0 GWt í 2020 í mun til 13,5 GWt árið fyri. Orsøkin til lægru framleiðsluna í 2020 var partvís, at einstakar myllur av tekniskum ávum ikki vóru tøkar ávís tíðarskeið, og skuldu umvælast. Harafturat vóru vindviður-skiftini yvirhøvur ikki eins góð til framleiðslu í 2020 sum í 2019.

Kostnaðurin fyri tilfar og tænastur í 2020 var 1,6 mió. kr. í mun til 1,3 mió. kr. árið frammanundan, meðan lønarútreiðslurnar í 2020 vóru 46 tkr. í mun til 42 tkr. árið fyri.

Avskrivingar eru gjørdar fyri 3,1 mió. kr. samsvarandi nýtta roknskaparháttinum.

Rentuútreiðslurnar vóru 478 tkr. í 2020, í mun til 516 tkr. í 2019.

Úrslitið eftir skatt fyri 2020 gjørdist -1,2 mió. kr. í mun til 645 tkr. fyri 2019.

**SERLIGIR VÁÐAR**
Felagið hevur lagt dent á at tryggja seg móti teimum váðum, sum hugsast kunnu uppstanda.

Felagið er við eini prísavtalu um móttøkutrygd tryggjað eina sølu upp á 8,4 GWt um árið til móðurfelagið SEV til ein avtalaðan prís, sum í 2020 var 44,84 oyru/kWt fyri framleiðsluna frá teimum 3 myllunum á Eystnesi. Fyri tær 2 myllurnar á Vørðuni er søluprísurin 40 oyru kWt. Harvið eru inntøkuviðurskiftini í einari fastari legu.

Felagið hevur eina SLA-avtalu (service level agreement), sum fevnir um, at øll umsitingarlig og teknisk viðurskifti verða umsitin av SEV.

Felagið er í samráðingum við veitaran av vindmyllunum um, at fáa í lag eina viðlíkahaldsavtalu á sama hátt sum hjá P/F Vindfelagnum í Húsahaga. Ein slík avtala tryggjar, at felagið kennir sínar kostnaðir av viðlíkahaldi, eykalutum og eftirliti.

Felagið hevur eitt langfreistað lán frá móðurfelagnum SEV, sum frá desember 2016 og tey næstu nærum 10 árini veitir felagnum somu føstu rentu, sum SEV sjálvt hevur tryggjað sær.

Felagið tryggjar sínar ognir samsvarandi tryggingarstrategiini hjá móðurfelagnum SEV.

**ÍLØGUR**
Felagið hevur í árinum framt íløgur fyri 69,9 mió. kr., sum viðvíkja vindmyllulundini í Porkeri.

Felagið lat í 2019 tilboð inn til myndugleikan um at seta upp vindmyllur í Porkerishaganum og vann útboðið í kapping við annan veitara. Felagið hevur gjørt íløgur í vindmyllulundina í Porkeri fyri íalt 73,9 mió. kr. við ársenda 2020. Vindmyllulundin varð formliga sett í rakstur 11. februar 2021.

**GJALDFØRIÐ**
Felagið hevur ikki egið gjaldføri. Felagið ger nýtslu av gjaldførinum hjá móðurfelagnum SEV til at rinda skyldur, so hvørt tær fella til gjaldingar, gjøgnum eina millumrokning við móðurfelagið SEV. Móður-felagið hevur gott gjaldføri, og hevur eisini tryggjað sær atgongd til rakstrarfígging næstu árini, um tørvur er á tí.

**UTTANHÝSIS UMHVØRVI**
Felagið leggur dent á at fara væl um umhvørvið, og at reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd.

**VITANARSTØÐI OG MENNING**
Felagið er saman við móðurfelagnum SEV ein aktivur mennari av vitan innan vindframleiðslu í Føroyum, og strembar framhaldandi at betra um góðskuna og mongdina av ravmagnsframleiðslu úr vindi.

**ÚTLIT FYRI RAKSTRARÁRIÐ 2021**
Felagið væntar eina neiliga ávirkan av skaðunum, sum myllurnar á Vørðuni/Eystnesi drógust við í 2020, so hesar koma at selja minni enn vanligt í 2021.

Felagið fer at taka vindmyllulundina í Porkeri í nýtslu í februar 2021, og væntast hon at selja fyri umleið 6,3 mió. kr. í 2021.

Ein formligur byggiroknskapur skal gerast fyri verkætlanina í Porkeri, og millumrokningin við móðurfelagið SEV, sum er upp á 63,5 mió. kr., skal í størstan mun umleggjast til langfreistað lán. Harumframt skal partapeningurin hækkast soleiðis, at felagið altíð hevur ein nøktandi eginpeningspart. Væntandi verður partapeningurin øktur við umleið 18 mió. kr., svarandi til ein eginpeningspart uppá 25% av verkætlanini. Partapeningurin í felagnum verður soleiðis umleið 25 mió. kr. aftaná umleggingina.

Samanlagt væntar felagið eina inntøku á 11,4 mió. kr. í 2021.

Roknað verður sambært fíggjarætlan felagsins við einum úrsliti upp á 241 tkr. fyri 2021.

**HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK**
Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

# Nýttur roknskaparháttur

**ALMENT**
Ársroknskapurin fyri P/F Vindfelagið í Húsahaga er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B.

Ársroknskapurin verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m., verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar saman-teljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundað til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknað upp á undirliggjandi tøl og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

**ALMENT UM INNROKNING OG VIRÐISÁSETING**
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somu-leiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum koma av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**UMROKNING AV FREMMANDUM GJALDOYRA**
Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

**RAKSTRARROKNSKAPURIN**

**NETTOSØLA**
Nettosøla verður tikin við í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í sambandi við søluna er frádrigin.

**VØRUNÝTSLA**
Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

**AÐRIR UTTANHÝSIS KOSTNAÐIR**
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av tilfari og øðrum tænastuveitingum umframt annan fyrisitingarkostnað.

**STARVSFÓLKAKOSTNAÐIR**
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**AV- OG NIÐURSKRIVINGAR**
Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

**FÍGGJARPOSTAR**
Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða tikin við í rakstrarroknskapin við teimum upp-hæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

## Fíggjarstøðan

**MATERIELL STØÐISOGN**
Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganar-virði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskriv-ingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Vindmyllur | 15 ár | 0 % |
| Rakstrargøgn | 3-5 ár | 0 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveg-anarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undir-veitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

**NIÐURSKRIVING AV STØÐISOGN**
Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Endurvinningarvirðið er tað hægra av nettosøluprísinum og kapitalvirðinum. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirðið av væntaðu nettoinntøkunum frá nýtsluni av ognunum.

**ÁOGN**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**TÍÐARAVMARKINGAR**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

**PARTAFELAGSSKATTUR OG ÚTSETTUR SKATTUR**

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður aftur-goldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum koma av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

**AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ**

Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktións-kostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað ogn ella skuld. Dagsvirðið av einari trygging verður roknað sum langfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir og, sum stuttfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

**GJALDFØRISTRYGGING**

Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

**SKULD**

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirði, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni soleiðis, at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

# Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

**Upphæddir í t.DKK**

| Nota | | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| 1 | Nettosøla | 3.809 | 5.732 |
| 2 | Annar kostnaður (tilfar og tænastuveitingar) | -1.599 | -1.300 |
| | **Bruttoúrslit** | **2.210** | **4.432** |
| | | | |
| 3 | Starvsfólkakostnaðir | -46 | -42 |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari støðisogn | -3.088 | -3.088 |
| | **Rakstrarúrslit** | **-925** | **1.302** |
| | | | |
| 4 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -478 | -516 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **-1.403** | **786** |
| | | | |
| 5 | Skattur av ársúrsliti | 253 | -142 |
| | **Ársúrslit** | **-1.150** | **645** |
| | | | |
| | **Uppskot til býti av ársúrsliti** | | |
| | Flutt úrslit | -1.150 | 645 |
| | **Býti tilsamans** | **-1.150** | **645** |

# Fíggjarstøða 31. desember

OGN í t.DKK

| Nota | | 31.12.20 | 31.12.19 |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 6 | Framleiðsluvirkir | 22.252 | 25.340 |
| 6 | Arbeiði í gerð | 73.856 | 3.980 |
| | **Materiell støðisogn tilsaman** | **96.107** | **29.320** |
| | **Støðisogn tilsaman** | **96.107** | **29.320** |
| | | | |
| | Millumrokning SEV | 0 | 5.011 |
| | Tíðaravmarkingar | 225 | 92 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **225** | **5.103** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **96.332** | **34.423** |



# Fíggjarstøða 31. desember

SKYLDUR í t.DKK

| Nota | | 31.12.20 | 31.12.19 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 7 | Partapeningur | 7.000 | 7.000 |
| | Javning avleidd fíggjarlig amboð | 4.530 | 5.681 |
| | Flutt úrslit | -2.147 | 0 |
| | **Eginogn tilsamans** | **9.383** | **12.681** |
| | | | |
| | Avsetingar til útsettan skatt | 994 | 1.247 |
| | **Avsetingar tilsamans** | 994 | 1.247 |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 8 | Langfreistað skuld | 14.862 | 17.643 |
| | **Langfreistað skuld tilsamans** | **14.862** | **17.643** |
| | | | |
| 8 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 2.781 | 2.721 |
| | Millumrokning SEV | 63.540 | 0 |
| 9 | Avleidd fíggjarlig amboð | 2.147 | 0 |
| | Onnur skuld | 2.625 | 131 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **71.093** | **2.852** |
| | **Skuld tilsamans** | **85.955** | **20.495** |
| | **Skyldur tilsamans** | **96.332** | **34.423** |
| | | | |
| **10** | **Maskinyvirlit** | | |
| **11** | **Veðsetingar og aðrar skyldur** | | |

Ársfrásøgn 2020

# Notur



# Notur 1–5

### 1. NETTOUMSETNINGUR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Framleiðsla av ravmagni | 3.809 | 5.732 |
| **Tilsamans** | **3.809** | **5.732** |

### 2. ANNAR KOSTNAÐUR (TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR)

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Maskinur | 1.110 | 827 |
| El og tøkni | 0 | 0 |
| Bygningar og lendi | 139 | 34 |
| Kanning og ráðgeving | 45 | 225 |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 305 | 214 |
| **Tilsamans** | **1.599** | **1.300** |

### 3. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Lønir | 46 | 42 |
| **Tilsamans** | **46** | **42** |
| | | |
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá felagnum | 0 | 0 |
| Miðaltal av starvsfólkum | 0 | 0 |

### 4. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Rentur, lán og bankaskuld v.m. (renta til móðurfelag) | 478 | 516 |
| **Tilsamans** | **478** | **516** |

### 5. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Javning av útsettum skatti | -253 | 142 |
| **Tilsamans** | **-253** | **142** |



# Notur 6–8

### 6. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 37.606 | 37.606 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **37.606** | **37.606** |
| | | |
| Av- og niðurskriving primo | -12.267 | -9.179 |
| Avskrivingar í árinum | -3.088 | -3.088 |
| **Av- og niðurskriving ultimo** | **-15.355** | **-12.267** |
| | | |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **22.252** | **25.340** |
| | | |
| Roknskaparligt virði ultimo 2019 | 25.340 | |
| | | |
| Arbeiði í gerð | | |
| Arbeiði í gerð primo | 3.980 | 2.239 |
| Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum | 69.876 | 1.741 |
| Liðug arbeiði førd til avskrivingar | 0 | 0 |
| **Arbeiði í gerð ultimo** | **73.856** | **3.980** |
| | | |
| Arbeiði í gerð ultimo 2019 | 3.980 | |
| | | |
| **Støðisogn ultimo** | **96.107** | **29.320** |
| | | |
| Støðisogn ultimo 2019 | 29.320 | |

### 7. EGINOGN

| Upphæddir í t. DKK | Partapeningur | Grunnur til avleidd fíggjar-lig amboð | Flutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Eginognaruppgerð 01.01.20 - 31.12.20 | | | | |
| Salda pr. 01.01.20 | 7.000 | 0 | 5.681 | 12.681 |
| Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð | 0 | -2.147 | 0 | -2.147 |
| **Ársúrslit** | **0** | **0** | **-1.150** | **-1.150** |
| **Salda pr. 31.12.20** | **7.000** | **-2.147** | **4.530** | **9.383** |

### 8. SKULD

| Upphæddir í t. DKK | Avdráttur fyrsta árið | Restskuld eftir 5 ár | Skuld tilsamans 31.12.20 | Skuld tilsamans 31.12.19 |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til móðurfelag | 2.781 | 6.142 | 17.643 | 20.364 |
| **Tilsamans** | **2.781** | **6.142** | **17.643** | **20.364** |

Til upplýsing í notuni er restskuldin eftir 5 ár útroknað sum annuitetslán við restáramáli upp á 10 ár frá 2016.

# Notur 9–11

## 9. AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ

| Upphæddir í t. DKK | Ogn 31.12.20 | Skuld 31.12.20 | Samlað 31.12.20 | 31.12.19 |
|---|---|---|---|---|
| Rentutrygging | 0 | -2.147 | -2.147 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **-2.147** | **-2.147** | **0** |

Avleidd fíggjarlig amboð eru nýtt at tryggja rentugjaldingar. Virðini í notuni omanfyri koma fram sum munurin millum amboðini á statusdegnum í mun til tað roknaða framtíðarvirði.

## 10. MASKINYVIRLIT VIÐ ÁRSLOK 2020

| Stað | Maskina | MW | Maskinslag | Framleiðari | Drívevni | Ár | Aldur | Tímar tils. | Tímar 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Neshagi, Eystnes | V1 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 9 | 55.856 | 1.007 |
| Neshagi, Eystnes | V2 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 9 | 61.128 | 7.101 |
| Neshagi, Eystnes | V3 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 9 | 55.530 | 2.801 |
| Neshagi, Vørðan | V4 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 9 | 59.486 | 4.259 |
| Neshagi, Vørðan | V5 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 9 | 62.231 | 6.809 |

## 11. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR 31.12.20

Felagið hevur ongar veðsetingar ella rættarsakir. Felagið er bundið at avtalum viðvíkjandi leigu, viðlíkahaldi og umsiting fyri íalt 438 tkr. í 2021.

www.sansir.fo

**P/F Vindfelagið í Neshaga**
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
www.sev.fo
sev@sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 622656
Skrásetingarnr. 6387